# Menakhem Ben-Yami – fiskarin á teimum sjey høvunum

**Fá vita líka nógv um umsiting av heimsins fiskastovnum sum ísraelin Menakhem Ben-Yami. Hann hevur vinir i kenningar í øllum heiminum - eisini í Føroyum. Nú kemur hann fyri fyrstu ferð til Føroyar at vitja**

*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*



Reiðarar og fiskimenn kenna hann, og báðir partar lurta hugtiknir tá Menakhem Ben-Yami greiðir frá og roynir at loysa fløkjur sum eru ringar at skilja hjá gerandisfólki. Millum føroyingarnar sum hava tikið Ben-Yami til sín er stjórin á Beta, Olaf Olsen og formaðurin í Fiskimannafelagnum, Óli Jacobsen.

Men hvat er tað sum ger at bæði høgur og lágur innan fiskivinnuna finna nakað áhugavert hjá Menakhem Ben-Yami. Hann er 77 ára gamal og hevur síðani seinna heimsbardaga búð í Ísrael.

Vit hittu Ben-Yami í hollendska býnum Haag, har hann millum annað hevði ein fund við Olaf Olsen. Teir tosaðu millum annað um eitthvørt samstarv har Menakhem Ben-Yami hevur kunnleikan og førleikan til at hjálpa Beta.

## Skilagóður

Hesin sera vitandi maðurin hevur luttikið í tveimum kríggjum, seinna heimsbardaga og krígnum í Palestina seinast í fýratiárunum tá staturin Ísrael bleiv stovnaður.

Men tað er sum altjóða serfrøðingur innan fiskivinnuumsiting at hann hevur stríðst longst.

Reiðarar og fiskimenn lurta í andakt tá Ben-Yami greiðir frá. Tað er eisini heilt týðuligt at hann fangar skjótt tað sum verður lagt fram, og beinanvegin hevur hann eina meting klára. Undir vitjanini í Haag sær hann fyri fyrstu ferð hagtølini hjá FAREC sum vísa hvussu fiskiskipini í Íslandi, Norra og Føroyum klára seg. Samstundis fær hann eina stutta gjøgnumgongd av hvussu skipaninar eru í hesum trimum londunum.

Hann spyr nakrar spurningar, og hevur so eina meting av støðuni klára. Hann tykist at hava eina týðuliga mynd av hvat som gongur gott, hvat sum gongur minni gott og hann hevur eina meting av hví skipini klára seg sum tey gera. Samstundis samanber hann skipaninar í hesum londunum við hvussu royndirnar hava verið av líknandi skipanum heilt aðrastaðni í heiminum.

Hann er sum ein brunnur av vitan.

– Hvussu stovnsrøktin skal vera er kanska tann mest umtalaði spurningurin á fiskivinnustovunum kring heimin. Tey flestu londini hava roynt ymsar skipanir og tað er sjáldan at vit síggja nakað sum ikki er roynt onkra aðrastaðni, sigur Menakhem Ben-Yami. Hann vísir millum annað til at tann føroyska fiskidagaskipanin hevur lutir sum hann kennir aftur frá skipanum sum eru royndar aðrastaðni.

Sjálvur hevur Menakhem Ben-Yami fiskað í Miðalhavinum, í Reyða Havinum og í Atlantshavinum. Sum ST-serfrøðingur hevur hann vitja kring allan knøttin og sæð hvussu tey ymsu londini hava loyst sína stovnsrøkt. Sjálvur var hann við fiskiskipi gjøgnum fimtiárini áðrenn hann fyrst í sekstiárunum fekk møguleikan at fara til Eritrea fyri ST-felagsskapin FAO. Her skuldi hann leggja teimum lokalu fiskimonnunum lag á. Eftir tíðina í Eritrea helt hann fram at arbeiða fyri FAO.

## Særdur undir krígnum

At hann kom so langt kann næstan sigast at vera rein tilvild. Hann luttók í seinna heimsbardaga. Hann stríddist móti nazismuni av øllum alvi. Ein dagin bleiv hann særdur, og fyri eftirtíðina var tað gott at tað vóru russarar sum fingu fatur á honum og lagt hann inn á eitt sovjettiskt sjúkrahús. Á sjúkrahúsinum brúkti hann tíðina til at læra seg russisk. Hetta tíðarskeiði gjørdi eisini at hann fekk gott samband við rættiliga nógvar sovjettbúgvar. Hesi vinarbond góvu honum innlit í hvussu Sovjetsamveldi hugsaði á fiskivinnuøkinum. Og framvegis í dag metir hann at tað hetta samveldið sum á so nógvar háttir var alt annað enn eitt paradís, at teirra hugburður innan fiskivinnu var nakað tey flestu kundu lært nakað av.

– Tá Sovjettsamveldi sendi skip út at fiska á einari nýggjari leið, so kom alltíð eitt havrannsóknarskip fyrst. Manningin á hesum skipinum skuldi gera royndir av heilsustøðuni í tí nýggja økinum: alt fra hita í sjónum til fiskasløg og mett mongd bleiv kannað. Tá granskararnir høvdu gjørt sítt fingu fiskiskipini lov at fara inn og fiska, sigur Menkhem Ben-Yami.

– Á hendan hátt høvdu tey eina sera viðkomandi vitan um øll økini tey fiskaðu. Ein vitan tey kundu taka fram og brúka tá fiskiskipini rýmdu ella fiskurin bleiv burturi. Tey kundu so aftaná meta um hvat fiskiskapurin hevði ført til.

## Eingin fullkomin skipan

Menakhem Ben-Yami meinar at tað er ógjørligt at finna eina skipan har stovnsrøktin umfatar alt.

– Vit mugu vita um so nógvar faktorar sum ikki uttan víðari kunnu setast inn í eitt roknistykki. Vit mugu kenna náttúruna betri, alt frá hitanum í sjónum, saltinnihaldið til onnur óbeinleiðis viðurskiftir sum kunnu ávirka tað endaliga úrsliti. Eitt úrslit sum álíkavæl ikki gevur tí røttu myndina, sigur Ben-Yami.

Hann vil ikki siga at nøkur skipan er betri enn ein onnur.

– Ein skipan má skræddaraseymast til hvønn einasta fiskastovn. Ein slík hugsan passar illani inn hjá skrivstovufólki og politikkarum, men skal skipanin virka rætt so er tað tað sum skal til. Stovnsrøktarskipanin má taka støði í tí einstaka stovninum; um fiskiskapurin er eftir bert einum fiskastovni ella fleiri samstundis; hvussu er havbotnurin: hvat fyri reiðskapur skal brúkast; hvussu er við samfelagnum og hvat byggir hetta á; politikkurin spælir inn; mentanin sum rosinan í pylsuendanum má skipanin hava við í roknistykkinum at veðrið iki letur seg stýra, sigur Ben-Yami og leggur afturat at tey sum fiska sjálvi eru við til at ávirka stovnarnar.

Ben-Yami sigur at fiskastovnarnir og teir ymsu fiskihættirnir eru so ymiskir at teir ikki eiga at viðgerast sum um alt sum svimur í havinum er tað sama.

– Ymsar fyritreytir eiga at handfarast ymiskt, sigur Ben-Yami.

Hann sigur at hann ikki hevur funnið tað skipan sum skarar serliga framúr.

– Um vit skulu hava allar tær fyritreytirnar við í roknistykkinum sum eg longu havi nevnt, so má svarið gerast nei. Men vit kunnu nokk finna skipanir sum nærkast eini skipan sum hevur alt. Tað landið sum gjøgnum siðarvin hevur ment eina slíka næstan fullkomnan skipan er Japan. Samstundis so hava USA og Australia skipanir har stovnarnir verða viðfarnir ymiskt. Men hetta merkir tó ikki at hesi londini ikki velja sama heilivág til øll sjúkueyðkenni sum raka eina fiskivinnu – í staðin fyri at finna rætta heilivágin til tær ymsu sjúkurnar. ES hevur roynt at broyta fiskivinnuskipanina heilt frá botni av, uttan at samveldið er komið á mál. Kanska vit hava brúk fyri nýggjum tonkum?, spyr Menakhem Ben-Yami, og letur svarið sveima í luftini.

## Kvotuskipanin ikki nóg góð

Royndirnar hjá Menakhem Ben-Yami siga honum at tað er trupult at finna eina skipan sum virkar nóg væl. Tær skipanir sum kunnu eydnast eru so strangar at tey sum skulu liva við henni skjótt vilja synda, og tá eru fyritreytirnar fyri at eydnast longu farnar.

– Kvotuskipanin setir eina ávísa kvotu fyri eitt avmarkað tíðarskeið fram í tíð, til dømis eitt ár. Myndugleikarnir kunnu við kvotuskipanini siga at ein stovnur tolur at 155.000 tons kunnu fiskast tað komandi árið. Við hesi skipanini er ikki møguligt at taka hædd fyri veðurlagsbroytingum og øðrum broytingum sum eingin kendi til tá kvotan bleiv ásett. Tey sum meta hvat stovnarnir tola meta í eftirtíð um tann kvotan tey mettu var røtt. Er ov nógv fiskað so noyðast myndugleikarnir at minka um kvotuna næsta ár, sigur Menakhem Ben-Yami. Hann vil ikki avvísa kvotuskipanina.

– Tað finnast góðar orsøkir til at velja antin kvotuskipanina sum Norge ella Ísland hava ella fiskidagaskipanina sum Føroyar hava. Kvotuskipanin rakar teir smáu og miðalstóru fiskiskipini, og vandin er fyri at rættindini savnast hjá nøkrum fáum stórum reiðarum. Tí kann ein siga at kvotuskipanin er tilpassa teimum reiðaríunum sum eru stór, ella teimum sum droyma um at gerast stór. Kvotuskipanin passar eisini best fjarfiskiflotanum best. Útróðrarbátar og smærri trolarar hava ikki alltíð somu fyrimunir. Fiskidagaskipanin passar væl har ov nógv skip eru til at fiska tann fiskin sum er til. Báðar skipaninar regulera fiskiskapin, spurningurin er bara um myndugleikarnir ynskja at fylgja fiskiskapinum frá dag til dag, sum fiskidagaskipanin, ella um ein er nøgdur við at seta kvotur sum byggja á fiskiskapin sum hevur verið, sigur Ben-Yami og leggur afturat:

– Har flotin er tilpassaður tí trýstinum fiskastovnarnir tola, er púra óneyðugt við bæði fiskidagaskipan og kvotuskipan.

## Broytingar koma

Menakhem Ben-Ymai er av tí áskoðan at fiskivinnusamfeløgini mugu duga at liva við broytingunum sum henda, óansæð hvørjar hesar eru.

– Alt er í broyting. Einki verður sum tað var. At halda fast við tað sum var gott fyrr er sjálvdan nøkur loysn. Einki í hesum heiminum er sum tað var, og tað mugu vit hava í huganum tá vit leggja til rættis fyri framtíðini.

– Eg vil ikki verja tað sum Sovjettsamveldið stóð fyri, men innan fiskivinnu høvd uteir eina sera áhugaverda skipan. Tey høvdu náttúruna við í roknistykkinum. Her vestanfyri var talan um at fiska so nógv sum møguligt sum hevði týdning. Framvegis er tað so at lond ikki hugsa um hvørja ávirkan veður og ovurfisking kann hava. Hygg bara eftir hvat sum hendi á Grand Banks, og hvussu er stætt í Eystursjónum.

Menakhem Ben-Yami sigur at allar søgurnar um fiskastovnar sum hvørva hava eitt til felags, og tað er at eingin var varðin tá broytingar hendu í veðurlagnum ella veiðutrýstinum.

– Vit mugu taka øll tekin um broytingar í einum stovni í fullum álvara, annars kann tað enda við at stovnurin verður oyðilagdur.



Salt

Ibiza Salt
Food Grade Salt
Best Fishery Salt in the World

M.J. SALTSØLA
Vestara Bryggja P.O. Box 204 FO-110 Tórshavn Faroe Islands tel.: +298 31 12 95 fax: +298 31 76 63
website: www.mjsalt.fo e-mail: mjsalt@mjsalt.fo

Kaj Andreasen & Co
Gerni til allar krevjandi reingerðisuppgávur t.d.:
- urtagarðin
- havin
- verkstøð
- flakavirkir
- alivinnuna
- umborð á skipum
- og mangt annað



HEILSØLA · SMÁSØLA · UMBOÐ
TEL 315600 · WWW.ANDREASEN.FO

HALDIÐ SOSIALIN
450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,- í mun til leysasølu
600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)
Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.
Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

FirePro
Nýtt innan sløkkiútgerð!
– Sjálvvirkandi og lótt at seta upp

Sera væl egnað til:
- maskinrúm
- servararúm
- el-talvurúm
- bilar
- teldur

og mangt annað!



Ring til okkara!

P/F Gummibátatænastan · Mannaskarð 4 · Tórshavn · Tlf 31 49 13